# Eru tøtt sum fløskan

**Arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarafeløgini eru farin undir samráðingarnar um nýggjan sáttmála, men ongin vil siga eitt orð um, hvørji krøv eru løgd fyri partarnar**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Arbeiðarafeløg og Arbeiðsgevarar sita enn einaferð yvirav hvørjum øðrum í samráðingum. Seinastu ferðirnar er tað endað við arbeiðssteðgi, men tað vóna tey bæði at sleppa undan hesuferð*
*Savnsmynd*

Nú hava arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir lagt til brots at samráðast um nýggjan sáttmála fyri tann, sum fer úr gildi 30. apríl.

Fyrsti fundurin ímillum partarnar var mánamorgunin, har teir hvør í sínum lagi løgdu krøvini til ein nýggjan sáttmála fram.

Men ongin av pørtunum vil siga eitt orð um, hvørji krøvini eru, tí teir hava avtalað, at hava tey innanveggja.

Partarnir fara nú hvør til sítt at viðgera krøvini frá hvørjum øðrum og so hittast teir aftur um eina viku.

Hóast ongin vil siga nakað um krøvini, verður sagt, at tann fyrsti fundurin var sum hann plagar at vera.

Øll tey fýra arbeiðarafeløgini, sum hava sagt sáttmálan upp, samráðast í felag. Tey eru Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmanna- og Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Sum einasta felag í landinum, hevur Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag gjørt av ikki at siga sáttmálan upp, so teir eru heldur ikki við í samráðingunum.

# Vilja at suðuroyingar skulu draga eina línu í framtíðini

**Seinastu tíðina hava røddir verið frammi í Suðuroy um at endurstovna felagið fyri kommunur í Suðuroy**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú eru røddir frammi um at kommunurnar í Suðuroy skulu samstarva meiri enn tær hava gjørt.

Í hesum sambandi hava kommunurnar umrøtt møguleikan fyri at endurstovna felagsskapin fyri kommunur í Suðuroy.

Møguleikin varð umrøddur á borgarstjórafundi á Tvøroyri fyri kortum og tey ymsu bý- og bygdaráðini skuldu síðani viðgerða málið.

Mánakvøldið viðgjørdi Tvøroyrar Býráð málið og har varð einmælt samtykt at taka undir við at endurstovna felagið fyri kommunurnar í Suðuroy.

Felagið fyri kommunur í Suðuroy hevur als onki við samanlegging at gera. Men tað er ein felagsskapir, sum hevur til endamáls at virka til gagns fyri Suðuroynni.

Eitt slíkt felag var í Suðuroy fyri einum 15 árum síðani, men tað datt niðurfyri. Fyri nøkrum árum síðani varð ein roynd gjørd at endurstovna tað, men tað fekk ikki undirtøku.

Verður felagið endurstovnað, koma umboð fyri tær sjey kommunurnar – helst borgarstjórarnir – í oynni at hittast við jøvnum millumbili at umrøða mál, sum hava felags áhuga.

Hetta halda býráðslimir á Tvøroyri vera ein stóran fyrimun, tí tað kemur alt ov ofta fyri, at kommunurnar í Suðuroy tosa rundanumhvønn annan, uttan at samansjóða sjónarmiðini og teir halda, at tað gagnar ikki oynni at hvør kommuna sær talar sínaa sak, tá ið mál, sum viðvíkja allari oynni, eru til viðgerðar.

# Vilja heldur stuðla lokalum kreftum

**Á Tvøroyri hevur býráðið havnað umsóknum um stuðul til landsumfatandi tiltøk, tí tey vilja heldur stuðla lokalum kreftum**

TVØROYRAR BÝRÁÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á Tvøroyri vil býráðið heldur stuðla lokalum tiltøkum og lokalum kreftum enn landsumfatandi tiltøkum og tað merkja bæði Oyggjaleikirnir og ungdómsráðstevna sviðan av*

Tvøroyrar Býráð vil heldur stuðla lokalum tiltøkum.

Tað var orsøkin til at býráðið á fundi mánakvøldið, havnaði umsóknum um stuðul til tvey landsumfatandi tiltøk.

Til fundin hjá Tvøroyrar Býráð mánakvøldið var umsókn komin um at lata fíggjarligan stuðul til eina ungdómsráðstevnu í Havn í heyst.

Men býráðið vísti einmælt umsóknini aftur.

Mentanarnevndin í býráðnum vísti á, at øll ungdómsráðstevnan varð miðsavnað í Havn og tí mælti nevndin býráðnum til at havna umsóknini fyri heldur at stuðla onkrum lokalum tiltøkum og tað varð einmælt samtykt.

Somu lagnu fekk ein umsókn frá oyggjaleikanevndini um at stuðla føroyskari luttøku á oyggjaleikunum í Hetlandi í summar.

Í hesum sambandi var støðan hjá býráðnum tann sama: Býráðið samtykti einmælt at havna umsóknini, tí býráðið vil heldur stuðla lokalum ítróttarfólkum beinleiðis, sum møguliga fóru at vera við í oyggjaleikunum.

Onkur býráðslimur helt, at tað var skeivt av Tvøroyrar býráð at stuðla oyggjaleikunum sum heild, tí ongin trygd var fyri at aðrar kommunur fóru at stuðla samsvarandi.

Størsta fíggjarliga stuðulin á fundinum mánakvøldið læt býráðið til eina stóra talvkapping, sum skal vera á Tvørori í summar og har fleiri altjóða meistarar vera við.

Býráðslimir søgdu, at hetta fór at seta Tvøroyri á heimskortið tað mesta av eini viku í summar og tað hildu teir verða vert at stuðla.

Sostatt samtykti býráðið einmælt at stuðla talvkappingini við 30.000 krónum.

Annars samtykti býráðið eisini at stuðla summartónum á Tvøroyri í summar við 3.500 krónum og sjó- og býarsavnið í býnum fekk 20.000 krónur í stuðuli.

## Vilja hava alla Suðuroy savnaða í eina barnavernd

**Tað tykist sum um at meiriluti fyri at savna alla Suðuroy í eitt barnaverndarøki**

BARNAVERND
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skal Suðuroyggin verða eitt barnaverndarøki, ella tvey?

Hetta er ein spurningur, sum tær sjey kommunurnar í Suðuroy nú royna at finna útav.

Men tað tykist sum um at meiriluti er fyri at skipa alla oynna í eitt barnaverndarøki.

Annars legði Vágs Býráð upp til at skipa Suðuroyar syðru helvt í eitt barnarverndarøki, sum sostatt skuldi umfata tær fýra kommunurnar, Sumba, Vágur, Hov og Porkeri.

Men Porkeris Kommuna svaraði aftur, at tey vildu heldur hava alla oynna í eina kommunu og samstundis bjóðaðu tey eini felags barnavernd í Suðuroy innivist í nýggju ráðhúsunum í Porkeri.

Mánakvøldið viðgjørdi Tvøroyrar Býráð so málið á fundi.

Har varð upplýst at hvørki sumbingar, hovbingar ella porkenningar vóru sinnaðir at ganga Vágs kommunu á møti, men vildu hava eina felags barnavernd.

Og á fundinum mánakvøldið samtykti Tvøroyrar Býráð eisini einmælt at taka undir við uppskotinum um at gera eina felags barnavernd fyri alla Suðuroy.

Býráðslimir á Tvøroyri hildu, at skuldi tosast um meiri samstarv ímillum kommunurnar í Suðuroy, var hetta eitt sjálvsagt mál at samstarva um.

Ætlanin er so, at ein sosial deild við fakfólki í barnaforsorg skal setast á stovn í Suðuroy. Tað skulu vera minst 1500 fólk í hvørjum barnaverndarøki.